# Fundarfrágreiðing til HSF-limafundi mikudagin 21. mai 2025

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Heini Ellingsgaard, Kristian Østergaard og Høgni Vilhelmsen fyri Starvsnevndina. Ári Rouch, Pól Hendrikkur Andreassen, Hallur Danielsen, Mark Lausen-Marcher og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Bjørg Patursson og Eyð Hansen fyri VÍF. Marið Heimistovu og Vivi Olsen fyri Stjørnuna. Eyðun Mortensen og Jan Otto S. Holm fyri Kyndil. Eyðun Joensen, Petur S. Dahl og Emy Sólvitsdóttir fyri H71. Sólja Jóanisdóttir fyri SÍF/Søljuna. Jóna Lisberg og Rudi Olsen fyri ÍA. Anja Weyhe fyri KÍF. Egi Danielsen fyri StÍF. Ikki umboðaði EB, VB, SÍFSøljan, Team Klaksvík og Neistin.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Eftirmeting av kappingarárinum 2024/25, Ári Rouch**
Ári Rouch tók samanum kappingarárið, sum sum heild var eydnast væl. Nógv fólk hava veirð í hallunum, serliga nú til FM-endaspælið. Onkrar viðmerkingar vóru í mun til ov langar dystarpausur í ávísum førðum. Roynast skal at byrgja upp fyri hesum til komandi kappingarár

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu umrøðuni gætur.

**2.0 Kunning um dómaraskeið og menningarátøk av dómaraøkinum, Ári Rouch**
Dómaranevndin hevur skipað fyri fýra væleydnaðum dómaraskeiðum í vár, har á leið 70 hava luttikið. Ætlanin er at hava skeið aftur í september. Dánjal Samuelsen er skeiðsleiðari og fer at standa á odda fyri dómaramenning og útbúgving í HSF. Tørvurin á dómarum til fremstu deildirnar er stórur og eru feløginin vælkomin at bjóða fram nýggjar dómarar, sum hava møguleikan at koma á uppstartsskeið og fáa vegleiðing og stuðul.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**3.0 Kunning um venjaraútbúgving, Andrass Thomsen og Mark Lausen-Marcher**
Andrass og Mark greiddu frá teimum venjaraskeiðum, sum hava verið í vetur og teimum sum koma seinni í ár. Tað er týdningarmikið at venjarar taka skeiðini, hetta serliga í mun til tey krøv, sum EHF í størri mun setur. Ætla feløg t.d. at luttaka í European Cup, so er tað frá 2026 eitt krav, at venjarin hevur útbúgving, hetta eisini galdandi fyri landsliðsvenjarar.

**3.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**4.0 Framløga av álmanakka 2025/26, Ári Rouch**
Ári Rouch legði fram uppskot til álmanakka fyri 2025/26. Greitt varð serliga frá tíðarskeiðunum, har a-landsliðini eru HM- EM-endspøl. Har eru fyrstu vikuskiftini eru løgd still fyri allar deildir, soleiðis at hondbóltsføroyar hava møguleikan at fara at hyggja í Trier og Oslo. Hjá monnunum er óvist, hvussu langt endaspælið er, hetta í mun til, hvørt teir koma víðari úr innleiðandi bólkinum ella ikki. Er tørvur á at flyta dystir í mun til hetta, vil kappingarnevndin verða jalig sinnað í mun møguligar fyrispurningar.

**4.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**5.0 Uppskot til samtyktar í mun til broytingar av steypakappingarreglum hjá ungdóminum, Ári Rouch**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, legði fram uppskot, sum eisini var frammi á seinasta limafundi. Skotið var upp at strika millumumfarið, um 8 ella færri lið luttaka í einari steypakapping hjá ungdóminum, hetta soleiðis at ovastu tvey liðini í hvørjum bólki koma beinleiðis í hálvfinalurnar. Hetta gevur eitt umfar minni, men tekur burtur eitt umfar, sum summi haldi er óneyðugt. Semja var ikki um uppskotið, hetta serliga tí liðini fáa færri dystir.

**5.1 Niðurstøða**
Semja var ikki um uppskotið, og ger kappingarnevndin ikki meira við málið fyribils.

**6.0 Framløga um arbeiði við fysiskari venjing, Pól Hendrikur Andreasen**
Pól Hendrikur Andreasen er nýggjur fysiskur venjari í HSF. Hann greiddi frá um seg sjálvan og um ætlanirnar fyri fysiska venjing í HSF og hjá feløgunum.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.